Til Fíggjarmálaráðið

Á Løgtingi, 17. mars 2021

**Viðv.: Uppskoti til lóg um veiðugjald**

Fyrst av øllum takka vit Landsstýrinum fyri, at taka stig til samráðingar í sambandi við viðgerðina av eini framtíðar skipan av veiðugjøldum í okkara høvuðsvinnu. Andstøðan hevur valt at svara teldupostinum frá Fíggjarmálaráðnum frá 10. mars í felag.

Vit eru í høvuðsheitum samd við leistinum, har eitt prosentgjald verður roknað av hvørjum fiskaslagi, sum so verður ásett í krónum pr. landað kilo í ásettum tíðarskeiði – og hevur ein stigvaksandi skala í mun til marknaðarprís. Slíkur leistur er einfaldur og fylgir í stóran mun prísgongdini í vinnuni.

Vit eru eisini samd við Landsstýrið um, at vit bara eiga at hava veiðugjøld í teimum pørtum av flotanum, har ein verulig tilfeingisrenta er. Gongdin hjá heimaflotanum hevur tíverri ikki verið góð seinastu 15 árini (undantikið einstøk ár), og tískil er mest sannlíkt eingin tilfeingisrenta í tí partinum av flotanum. Vit taka tí undir við, at einki veiðugjald verður álagt heimaflotanum.

Viðvíkjandi Barentshavsflotanum, og ikki minst uppisjóvarflotanum, er eingin ivi um, at har finst ein stór tilfeingisrenta. Tá ein tilfeingisrenta er til staðar, fáa veiðirættindini eitt stórt virði. Spurningurin er, hvør skal hava hetta virðið. Tekur landið ikki tilfeingisrentuna inn, fær loyvishavarin ein serstakan og óvanliga stóran vinning, sum onki hevur við egna virðisskapan at gera, ella í ringasta føri verður tilfeingisrentan kapitaliserað, tá loyvi og veiðirættindi verða seld á privata marknaðinum. Tá eru tað tey, sum fara úr vinnuni, sum taka tilfeingisrentuna við sær, meðan tey, sum koma inn í vinnuna, átaka sær eina stóra skuld og harvið ein stóran váða.

Vit halda tí, at tað hevur stóran týdning, at landið tekur størsta partin av tilfeingisrentuni inn. Hetta av tvinnum orsøkum: At tilfeingisrentan kemur øllum fólkinum til góðar, og at vinnan, sum frá líður, ikki verður ov skuldarbundin.

Um vit ikki taka tilfeingisrentuna inn nú, er vandi fyri, at tað ikki ber til at koma afturum aftur. Tá tey, sum í dag sita á tilfeinginum, hava selt veiðirættindini og harvið ognað sær tilfeingisrentuna, verður sera trupult hjá landinum at taka tilfeingisrentuna inn.

Uppskotið hjá Landsstýrinum byggir ikki á nakrar útrokningar ella verulig tøl um, hvat tilfeingisrentan er. Landsstýrið hevur saman við umboðum fyri størstu reiðaríini ásett eitt tilvidarligt prosenttal á fýra fiskasløg/fiskiskapir sum eina politiska semju ella “politiskan handil”. Tilfeingisgjøldini eru tí mest sannlíkt langt undir veruligu tilfeingisrentuna (ikki minst tá prísirnir eru høgir). Tí kann andstøðan ikki taka undir við uppskotinum.

Somuleiðis harmast andstøðan um, at samgongan stutt eftir valið samtykti eina nýggja fiskivinnulóggávu, uttan andstøðan á nakran hátt varð tikin við í tað arbeiðið. Andstøðan var sera hørm um, at øll uppboðssøla varð avtikin, at keyp og søla av veiðirættindum varð loyvd millum

privat, og ikki minst at bæði verandi útlendskur kapitalur og nýggjur kapitalur vórðu boðin vælkomin aftur í okkara fiskivinnu, eftir at undanfarna samgonga hevði fingið samtykt, at allur útlendskur kapitalur skuldi úr okkara fiskivinnu.

Sum vit hava víst á higartil á teimum fundum, ið verið hava, so mæla vit til, at allir flokkar beinanvegin fara undir veruligar samráðingar, har semjast kann sum minstamark um hesi mál:

1. At veruliga tilfeingisrentan, bygd á verulig tøl og útrokningar, í størsta mun verður tikin inn til landið.
2. At útlendskur ognarskapur verður tikin úr føroyskari fiskiveiði og veiðirættindum.
3. At privat keyp og søla av framíhjárættinum at fiska og harvið tilfeingisrentuni verður støðgað.

Vegna andstøðuna

Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin    Høgni Hoydal, Tjóðveldi    Ruth Vang, Framsókn